# Henry og Schevchenko til Føroya í september

**Ukraina rýmdi heim uttan at skriva undir avtaluna, sum hini seks londini í okkara bólki í EM-undankappingini vórðu blivin samd um. Samberært uppskotinum spæla Føroyar seks landsdystir í heyst, og heimadystirnir í ár verða ímóti Fraklandi, Ukraina og Georgia**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Sambært uppskotinum um komandi EM-undankappingina í fótbólti skulu Føroyar spæla ímóti Fraklandi og Ukraina á heimavølli longu í september, meðan Italia kemur á vitjan í juni næsta ár*

Føroyar leggja fyri við útidysti ímóti Litava tann 16. august í ár, og undankappingin endar í Ukraina tann 21. november 2007.

Í síðstu viku vóru umboð fyri Fótbóltssambandið á fundi í Paris, har tosað varð um, hvussu næsta undankappingin í fótbólti skal spælast. Føroyar og øll hini londini í okkara bólki hittust fyri at leggja eina skrá fyri dystirnar, og hóast samráðingarnar vóru sera truplar, komu seks av teimum sjey londunum í okkara bólk til eina niðurstøðu.

Bert Ukraina vildi ikki skrivað undir avtaluna, og tað komst av, at umboðini fyri Ukraina, sum vórðu á fundinum, helst ikki høvdu mandatið til at gera samráðingarnar lidnar.

Á middegi mánadagin skuldu londini svarað endaliga, um tey góðtaka uppskotið, sum londini gjørdu í Paris.

### Totti næsta ár

Uppskotið, sum Føroyar, Frakland, Italia, Skotland, Litava og Georgia eru blivin samd um, verður eftir øllum at døma gjøgnumført, og sambært tí skulu Føroyar spæla seks landsdystir í heyst og seks landsdystir næsta ár.

Kappingin byrjar við einum útidysti í Litava hálvan august, og síðani koma tríggir heimadystir á rað. Fyrst kemur Frakland á vitjan, nakrar dagar seinni Ukraina, og síðani Georgia.

11. oktober skulu Føroyar spæla í Italia, og landsliðsárið endar ikki fyrr enn hálvan november, tá ið Føroyar spæla í Skotlandi.

Stórur spenningur er ivaleyst um, nær italsku stjørnurnar koma til Føroya at spæla, og sambært uppskotinum, koma Totti og hansara harkalið til Føroya tann 6. juni næsta ár.

### Tveir dystir í november

Bæði í ár og næsta ár skal føroyska landsliðið spæla Føroyar í Ukraina. Harafturat liggur ein landsdystur 28. mars næsta ár.

10 av teimum 12 dystunum, sum Føroyar skulu spæla, liggja frá august til november, meðan bert tveir dystir eru um várið.

Orsøkin til hetta er, at tey stóru londini vilja ikki spæla landsdystir í til dømis juni mánaði, og tí falla teir flestu dystirnir um heystið.

Um uppskotið, sum seks av teimum sjey londunum, eru blivin samd um, verður til endaligu dystarskránni fæst at vita, eftir at londini skuldu geva endaligt svar um middagsleitið mánadagin.

## FAKTA

Seks av teimum sjey londunum í okkara EM-bólki eru blivin samd um hesa dystarskránna fyri komandi undankapping. Bara Ukraina hevur ikki skrivað undir avtaluna, sum sær soleiðis út:

| | |
|---|---|
| **2006** | |
| 16. august | Litava-Føroyar |
| 02. september | Føroyar-Frakland |
| 06. september | Føroyar-Ukraina |
| 07. oktober | Føroyar-Georgia |
| 11. oktober | Italia-Føroyar |
| 15. november | Skotland-Føroyar |
| **2007** | |
| 28. mars | Georgia-Føroyar |
| 06. juni | Føroyar-Italia |
| 22. august | Føroyar-Litava |
| 08. september | Føroyar-Skotland |
| 12. oktober | Frakland-Føroyar |
| 21. november | Ukraina-Føroyar |

# Start fekk avsmurning

**– Vit hava stórar trupulleikar, sigur venjarin hjá Toda Jónsson í Start. Sunnudagin tapti Start heilti 4-0 ímóti Hammarby. Todi var ikki við á liðnum hjá Start**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Start fekk av at vita, tá ið felagið spældi í Royal League sunnudagin. Start spældi á útivølli ímóti Hammarby og tapti eyðmýkjandi 4-0.

Todi Jónsson og fleiri aðrir spælarar vóru ikki við í dystinum vegna skaðar.

– Vit mugu bara viðurkenna, at vit hava stórar trupulleikar í løtuni, og tað mugu vit gera nakað við, sigur venjarin Tom Nordlie við Fedrelandsvennen.

Tá ið blaðið royndi at fáa venjaran hjá Start at siga meira um støðuna hjá liðnum, vildi hann einki siga, og blaðið heldur, at venjarin tóktist verða undir tr‡sti eftir dystin.

– Síðani kappingin endaði í fjørheyst hava vit ikki borið okkum at, sum eitt topplið eigur at gera. Tað er ógjørligt at vinna eina dyst, um tú letur tvey ella trý mál fara inn við deyðbóltum hvørjaferð, sigur venjarin.

### Mugu práta um støðuna

Tað eru slakir tveir mánaðir, til norska landskappingin byrjar aftur, og tí er tíðin hjá Nordlie og hansara liði knøpp fyri at fáa vent gongdini.

– Tað tykist, sum at spælararnir ikki eru nóg ídnir og aggressivir, sigur spælarin Fredrik Strømstad, og hann fær viðhald frá liðformanninum Bård Borgersen:

– Í fjør fóru vit á vøllin til hvønn dyst fyri at vinna og knúsa mótstøðuna. Nú hugsa vit meira um at einki mál skal fara inn hjá okkum, sigur hann.

Fredrik Størmstad heldur, at spælararnir skulu taka eitt prát um støðuna, men hann mælir frá at tosa um nakra veruliga kreppu á liðnum.

## KR í Spania

Íslendska felagið KR er farið til Spania at venja og spæla dystir næstu tíðina. Felagið hjá Rógva Jacobsen skal verða við í La Manga Cup, og tríggir dystir eru á skránni í fyrstu syftu. Mánadagin skuldi KR spæla ímóti norska felagnum Tromsø, hósdagin ímóti Krylya Sovetov, og næsta mánadag ímóti Brann.

19. februar fer føroyska fótbóltslandsliðið til USA á venjingarlegu, og tá skal Rógvi við. Hann kann tí ikki verða við í øllum dystunum hjá KR á La Manga.

## Øll fáa trý stig

Fótbóltssambandið hevur endurskoðað kappingarreglurnar fyri yngri deildir, og ymsar tillagingar eru gjørdar. Í fleiri av yngru deildunum hevur vinnandi liðið fingið tvey stig fyri dystin, men hetta skal broytast, so at øll lið, sum vinna ein dyst, fáa trý stig. Tað skal loysa seg at vinna, sigur FSF. Harafturat broytir FSF eisini talið á útskiftarum í teimum yngstu deildunum, so at øll lið í øllum aldri kunnu hava fimm skiftisspælarar á liðnum til ein dyst. Hetta var eitt av málunum, sum vóru frammi á fundinum um ungdómsfótbólt, sum FSF skipaði fyri leygardagin.

## Unglingar útvísast eina løtu

Fótbóltssambandið ætlar at royna eina nýggja revsing fyri gul kort í unglingadeildini í fótbólti. Fær ein spælari eitt gult kort í einum landskappingar- ella steypadysti skal hann av vøllinum í 10 minuttir. Hesa løtuna má liðið hjá honum so klára seg við einum spælara færri á vøllinum. Hetta er ein skipan, sum verður brúkt í øðrum londum, og royndirnar eru góðar. FSF hevur umhugsað at lata hesa skipan galda fyri allar ungdómsdeildir, men feløgini vilja fyrsta royna skipanina í unglingadeildini. Tað gula kortið verður tí ikki skrásett á nakran hátt, men fær ein spælari tvey gul kort í sama dysti, so er tað at rokna sum eitt reytt kort, og so er revsingin útvísing og leikbann.

## Súni uttanfyri í Oslo

Súni Olsen spældi ikki við, tá ið AaB sunnudagin fekk javnleik ímóti Lyn í Royal League. Súni spældi ein sera góðan dyst mitt í síðstu viku, men hóast góða avrikið hevði venjarin hesaferð valt tann vanliga høgra bakkin, Allan Olesen, fram um Súna. Dysturin ímóti Lyn, sum varð spældur í Oslo, endaði málleysur, og tað vóru teir í AaB nøgdir við.

## Coventry tapti stórt

Føroysk landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen spældi seinasta hálva tíman av dystinum ímillum Coventry og Watford leygardagin. Støðan var 2-0 til Watford, tá ið Claus kom á vøllin, men tað gjørdist enn verri fyri Claus og teir, tí Watford vann heili 4-0. Coventry spælir í Championship, sum er næstbesta enska deildin, og har liggur liðið í niðaru hálvu av stigatalvuni.

## Jón Rói fær frið í 10 dagar

Læknin hjá AaB sigur, at Jón Rói Jacobsen fer at koma skjótt fyri seg aftur, eftir at hann fekk ein løst í knæið á venjingarlegu í Turklandi.

– Jón Rói kann taka tað róligt. Krossbandið heldur, men hann hevur fingið ein snudd í knæið, sum skal fáa frið fyri fyrst, sigur læknin Søren Kaalund.

– Nú skal Jón Rói halda frí í einar 10 dagar, og so fara vit at hyggja nærri eftir skaðnum og hvussu hann skal venja uppaftur. Tað nýtist ikki at taka langa tíð hjá honum at koma fyr seg aftur, sigur hann við heimasíðuna hjá AaB.

## Frem tapti

Jónas Tór Næss spældi við frá byrjan, tá ið danska 1. deildarliðið Frem spældi venjingardyst ímóti Trelleborg um vikuskiftið. Frem fekk bestu byrjanina, tí teir løgdu seg fram um 1-0 longu eftir fimm minuttir. Men Trelleborg mannaði seg upp og vann dystin 2-1. Málmaðurin Gunnar Nielsen var ikki á vøllinum, men umframt Jónas kom eisini verjuspælarin Atli Gregersen inn í seinna hálvleiki.